# "Brátt ljóma paukur og strúkarar aftur í norði"



Ein visión í sa
málið liva sít
andliga og m

**Innihaldsliga er nýggja yrkingasavnið hjá Hanusi Kamban, Café Europa, spennandi og tankavekjandi. Í formi og arkitekturi originalt og gjøgnumtonkt. Her eru eingir banalitetir, men víðsjón og europeisk mentan**

## Ummæli



Rolf Guttesen

Hanus Kamban er ein maður, sum hevur lisið, kannað og sæð. Hann hevur ferðast, upplivað og undrast. Hann er ósmæðin og djarvur í sínum málbrúki. Hann hevur óvæntaðar sjónarvinklar og associatiónir, har føroyskt, modernað, klassiskt, popp-beat-rock og Guinness á Dickens Bar verður serverað ómakaleyst. Spurningurin er so, um víðsjón er tað sama sum visión. Neppa. Og tó?

Slært tú á glasið, so hoyrist ein reinur klingandi tóni í langa tíð - hetta er krystal uttan rivur ella bløðrur. Men hvat vil hesin singularitetsins villfalkur siga okkum?

### Eksistentialisma og Terra Incognita

Ein partur av andsmentanini í yrkingum Hanus Kambans er leitingin eftir tí eksistentiella. Í yrkingini "Heim" verða hesi tingini søgd púra einfalt við (næstan) vanligum orðum:

*heim rópar sálin heim eg*
*taki bussin og fari út í býarins*
*terra incognita og fari av*
*á skeivum stað*

Longu her bivar hjartað, tú ert farin skeivur, finnur ikki. Longu her rullar tragedian.

Eisini tað basala og í grundini banala– at fara herfrá – er viðgjørt. Sum í yrkingini "Skríggið", ið at enda hevur hesar reglur:

*hvar at fara?*
*hvar at vera?*
*hvar at rýma?*
*brátt at skýma?*

*koyggjuhurð smellir: veri her*
*ongar dyr*

Kanska bendir heitið á yrkingini á Edvard Munch, men hjá mær kom Salvador Dali ófráboðaður upp úr eskjuni. Surrealisma?

Av tilvild – kanska - er arkitekturin í fyrstu yrkingini í

